# MC Hár fyri fyrstu ferð í tvey ár

**Provokerandi føroyski rockbólkurin, MC Hár, fer at ólavsøkukonsertini at hava sína fyrstu konsertframførslu í meira enn tvey ár**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



*- Vit hava 10 ára føðingardag í ár, so hetta verður okkara føðingardagsveitsla. Men ístaðin fyri reyðar pylsur, sum sølubúðirnar hava einarætt uppá, fara vit at bjóða okkurt gott til eyguni og oyruni. Og sjálvandi kærleika, sigur sangarin í MC Hár, Niels Uni Dam*

Ein av bólkunum, sum fer at spæla á ársins ólavsøkukonsert, er MC Hár. Teir hava áður gjørt rættiliga vart við seg - bæði á konsertum og á útgávum - men seinastu tvey árini hevur lítið verið um teir.

- Vit hava ikki spælt seinastu tvey árini, ja, vit hava í roynd og veru næstan ikki verið í sama landi hesi bæði árini, sigur Niels Uni Dam, sum plagdi at kalla seg andaligan leiðara í MC Hár.

- FUT spurdi okkum, um vit vildu vera við á ólavsøkukonsertini í ár, og tað kom eitt sindur óvart á okkum. Vit hava einki spælt seinastu tvey árini, og onkrir limir eru farnir burturúr, so vit hugsaðu okkum væl um, áðrenn vit søgdu ja til tilboðið, sigur Niels Uni Dam.

Hann heldur, at ólavsøkukonsertini altíð er stuttlig at vera til, og tí hevur MC Hár hug at verða við.

- Vit hava 10 ára føðingardag í ár, so hetta verður okkara føðingardagsveitsla. Men ístaðin fyri reyðar pylsur, sum sølubúðirnar hava einarætt uppá, fara vit at bjóða okkurt gott til eyguni og oyruni. Og sjálvandi kærleika.

## Spæla útgivin løg

Stóra útskiftingini í MC Hár hevur við sær, at MC Hár ætlar sær ikki at spæla nýggjar sangir á ólavsøkukonsertini.

– Vit fara at spæla løg av okkara fløgum. Sjálvt um vit hava okkurt, sum er á veg, so er tíðin ikki til at venja hesar sangir til konsertina á ólavsøku, sigur Niels Uni Dam.

– Tað er stuttligt at spæla á ólavsøkukonsertini, tað eru altíð nógv fólk og gott lív í. Hon passar væl til ein visuellan bólk sum okkara. Men konsertini kann eisini verða nakað kaotisk,tí tað eru nógv pallskift, og tað kann verða trupult hjá til dømis ljóðmonnunum.

Hvørjar ætlanir hava tit?

– Vit hava ongar stórar ætlanir. Okkurt verður kanska á skránni í Danmark seinni, men einki er vist enn. Vit ætla at skriva nýggj løg og fáa nýggju stammuna í bólkinum at rigga. Vit arbeiða altíð við stuttligum hugskotum, men vit ætla okkum ikki at gerast verðisstjørnur – heldur ikki í Føroyum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og okkurt ælið, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Fleyr til gul av útsynningi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

Veðrið fríggjadagin og Ólavsøkuaftan:
Fríggjadagin fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men Ólavsøkuaftan veksur hann vindin av suðri og regn ella mjørki. Hitin millum 11 og 15 stig.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 14 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 18 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 16 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 23 |
| Moskva | 30 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 32 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 30 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 14 |
| New York | 28 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 9 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 999 hPa. sunnan fyri Ísland fer í landnyrðing.




Lágtrýstið millum Íslands og Føroya fer norðureftir og grynnist. Hátrýstið við Hvarvið breiðir seg spakuliga eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/07 kl. $06^{00}$– 23/07 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 9,7°
Minsti hiti máldur í juli 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 22/07 kl. $06^{00}$– 23/07 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juli: 35,9 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 27. juli: | Fyrra kvarter |
| 4. august: | Full sól |
| 5. august: | Mánin longst frá jørðini |
| 12. august: | Seinna kvarter |

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24. juli | 10.37 | 23.02 | 09.37 | 22.02 | 09.52 | 22.17 | 00.12 | 12.37 | 01.12 | 13.37 | 08.52 | 21.17 | 07.52 | 20.17 | 10.52 | 23.17 | 11.52 | — | 10.22 | 22.47 | 11.37 | — |
| 25. juli | 11.26 | 23.51 | 10.26 | 22.51 | 10.41 | 23.06 | 01.02 | 13.26 | 02.02 | 14.26 | 09.41 | 22.06 | 08.41 | 21.06 | 11.41 | — | 00.17 | 12.41 | 11.11 | 23.36 | 00.02 | 12.26 |
| 26. juli | — | 12.14 | 11.14 | 23.37 | 11.29 | 23.52 | 01.51 | 14.14 | 02.51 | 15.14 | 10.29 | 22.52 | 09.29 | 21.52 | 00.06 | 12.29 | 01.06 | 13.29 | 11.59 | — | 00.51 | 13.14 |
| 27. juli | 00.37 | 13.11 | — | 12.11 | — | 12.26 | 02.37 | 15.11 | 03.37 | 16.11 | 11.26 | — | 10.26 | 23.01 | 00.52 | 13.26 | 01.52 | 14.26 | 00.22 | 12.56 | 01.37 | 14.11 |
| 28. juli | 01.46 | 14.22 | 00.46 | 13.22 | 01.01 | 13.37 | 03.46 | 16.22 | 04.46 | 17.22 | 00.01 | 12.37 | 11.37 | — | 02.01 | 14.37 | 03.01 | 15.37 | 01.31 | 14.07 | 02.46 | 15.22 |


BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
l. 21 0 a 21

Uppsetan av antennum og parabolum
Ring og høyr nærri ella støkk inn á gólvið

Søla og tænasta
Verkstaður
Antennu- og parabolmontering
Útleigan
radioep@olivant.fo
RADIOHANDILIN
N. Finsensgøta 16 · FO- 100 Tórshavn
Tlf. 318277 · Fax 318377

Sera bíligt at LEIGA SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544

www.sosialurin.fo

Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo
HESTPRENT